Sunnnudagin kl. 18 er møti, barnamøti (sunnudagsskúli ) er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6:15 er morgunbøn.

**KFUM & K, Klaksvík Missiónsvika**
Fríggjadagin kl. 19.30, Møti v/ Hanus Simonsen. Tórhild Bjarkhamar syngur.
Leygardagin kl. 9.30 Morgunmatur, kl. 10 Bíbiltími, kl. 19.30 - Møti v/ Margeir Toftegaard og fuglafjarðar manskór
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Bjartur Johannessen. Sangur frá KFUM & K kórinum og Bjartur sjálvum.
Náttúrði verður eisini at fáa www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn-& lovsangur, kl. 18 møti.
Mikudagin kl. 20 bíbliutími Op. 2,12-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Sandoy**
Møti verður í Samljóð leygardagin kl. 19. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14, onki møti vegna missiónsviku í Sandvík.

**Bethel, Vágur**
Leygardagin 10. november kl. 20 Ungdómsmøti.
Øll eru vælkomin.

**Missiónsvika í Sandvík verður hildin í kirkjuni**
Fríggjadag 9. nov. kl. 20, Terji Nielsen talar, Sekstett av Tvøroyri syngur.
Leygardag 10. nov. kl. 20, Niels Jacob Nielsen talar, Mourits Viderø syngur.
Sunnudag 11. nov. kl. 18 Jónsvein Bech talar, Kórið úr Porkeri syngur.

**Aglow Suðuroy**
Møti verður í Skúlanum í Sumba leygarkvøldið 10/11 kl. 19.30. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Eysturoyar gongufelag - Jólaborðhald**
verður í Gjáargarði fyri limir í Eysturoyar gongufelag leygardagin 1. desember. Um tú hevur hug at vera við, so sig frá hjá Asbjørn tlf. 282129, Kristian Martin tlf. 775100 ella Óla tlf. 254272 áðrenn 15. nov.

**Ørkin, Reykjavík**
Föroyska Sjómansheimið "Ørkin" í Reykjavík (Brautarholti 29 ) fær vitjan úr Föroyum um vikuskiftið! Leygardagin kl. 20 er kvöldvaka, Heri Joensen prestur í Tórshavn sigur sögur, skemt og andakt.
Sunnudagin kl. 15 föroysk guðstænasta í Háteigskirkju, Heri Joensen prædikar! Eftir guðstænastuna er kaffi og prát á Sjómansheiminum Örkini.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur 12. nov.***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 - 12.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Maritu
14.00 - 16.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Maritu
11.00 - 11.45 Enskt talumál
14.00 - 17.00 Kortspæl og o.o. spøl
***Týsdagur 13. nov.***
9.00 - 10.30 Tekstviðgerð (lítið royndir brúkarar) Páll Poulsen
10.30 – 12.00 Goyma í ymiskum goymslum (royndir brúkarar) Páll Poulsen
10.00 – 11.30 Vit syngja Knút Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Íverksetan av Eden á Giljagarði í Leirvík. Við orðum og myndum, Margaret Johannesen, Edensamskipari. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagur 14. nov.***
9.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen.
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Bindiklubbur. Øll eru hjartaliga vælkomin.
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Sigrid Dalsgaard
12.00 Døgurði
15.00 Túrur við ella uttan stavar út í Svanga.
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur 14. nov.***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
Lesibólkurin hittist aftur 22. nov. Bókin: »Í havsins hjarta«, Gunnari Hoydal verður lisin
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 15. nov.***
10.00 - 13.30 Øll áhugaði, sum hava melda seg til matgerð fríggjadag hittast evni: Jólaborð ?
10.00 - 17.00 Opið hús
***Tilmelding til jólasøluna, ið verður 26. nov. – 1. des. kl. 10.00 – 17.00***
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
***Fríggjadagin 9. nov.***
Boccia. Ræstkjøtaveitsla verður í Bygdarhúsinum í Leirvík hóskvøldið 22. nov. k. 17. Súpan, ræst kjøt, kaffi, dessert, felagsangur, undirhald, burturluting, kaffi, te, køkur. Møguleiki verður eisini at fara upp á gólv. Kostnaður 250 kr. Bussur koyrir frá Fløvanum. Tekning innan 15. nov.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 12. nov.***
Upplestur, vit lesa Nóatún,
***Mikudagin 14. nov.***
Vit Boccia í kajllaranum.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Sandoyar Kunningarstova**
*210 Sandur*
*www.visitsandoy.fo*
*tlf. 361836*
Skrivstovan er opin mánadag til fríggjadag kl. 13-16.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
er opin týsdag og hósdag frá kl. 19.00-21.00.
Tlf. 318586.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18.
Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum**
hevur hesi telefon nr.:
form. 313484 - 219584
næstform. 421092 - 281179
nevndarl. 319588 - 212839.

**Spælistovan í Margarinufabrikkini**
Opið er mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri børnum/foreldrum uttan ansing.

**HUFF, Hundaeigarafelag Føroya**
*limur í Dansk Kennelklub, kreds 12.*
Telefonin hjá felagnum er: 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum.
Hvørt týskvøld kl. 19.00 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

**Giktafelag Føroya**
**MBF-húsið**
**Íslandsvegur 10c**
**100 Tórshavn**
Tlf: 310237
Opið er týsdag og hósdag frá 13.00 til 16.00.

# *Brúðarmyndir*



*Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við blómum, gávum, heilsanum og á annan hátt gjørdu okkum brúdleypsdagin 20. oktober 2007, so hugnaligan. Takk fyri alla ta hjálp vit fingu.*
***Blíðastu heilsanir Bette og Kasper***



*Hjartaliga takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á brúdleypsdegi okkara 7. juli 2007 og vóru við til at gera dagin ógloymandi.*
***Katrine og Jógvan Páll***



*Hjartaliga takk til tykkum, sum á ymsan hátt gleddu okkum so ríkiliga á brúdleypsdegnum 3. mars 2007.*
***Inga Maria og Júst Svínoy***